# Aliskeið

Fiskivinnuskúlin skipar fyri tveimum skeiðum til alivinnuna í februar 2000. Pláss er fyri 20 luttakarum á hvørjum skeiði.

| | |
|---|---|
| 1. skeið: | **Skeið fyri alarar á sjónum 7. og 8. februar 2000** |
| 2. skeið: | **Skeið fyri smoltalarar 14. og 15. februar 2000** |
| **Málbólkur:** | Starvsfólk í føroysku alivinnuni, sum ikki hava serliga útbúgving |
| **Fortreytir:** | Luttakarar skulu hava arbeiðsroyndir í alivinnuni |
| **Undirvísarar:** | Serfrøðingar í føroysku alivinnuni |
| **Skipan:** | Skeiðini verða skipað sum vistarskeið á Hotel Eiði |
| **Skeiðskostnaður:** | Kr. 3.500 fyri hvørt skeiðið (verður kravt inn undan skeiðunum). |

Undirvíst verður m.a. í:
Laksalívfrøði, fysiologi, fóður og fóðring, aling og umhvørvi, ljós, kynsbúning og vøkstur, smáverur, sjúkufyribyrging, smoltifisering, vatndygd, reinsing, resirkulering, tøka, hagreiðing og útflutningur.

Freistin at melda seg til skeiðini er **21. januar**. Tilmelding fer fram við at ringja til Fiskivinnuskúlan á tlf. 42 45 73, ella um teldupost: fiskvest@fiskvest.fo . Til ber eisini at senda ella faxa okkum innskrivingarseðilin niðanfyri. **Tilmeldingin er bindandi**. Skeiðini eru treytað av nóg stórari undirtøku.



**Fiskivinnuskúlin**
Postrúm 96, 350 Vestmanna
Tlf. 42 45 73 • Fax. 42 44 28



**Innskrivingarseðil til aliskeið**

**Smoltskeið:** __ Set kross **Aling á sjónum:** __ Set kross

| | |
|---|---|
| Eftirnavn: | Føðingardagur: |
| Fornavn: | Starv/Arbeiðspláss: |
| Gøta: | Tlf. arbeiði: |
| Postnr./stað: | Tlf. heima: |
| Teldupostur: | Gjaldari: |

# Skeið í innaneftirliti

Skipað verður fyri skeiði í innaneftirliti. Skeiðið er í trimum eindum. Til ber at melda seg til eina, tvær ella tríggjar eindirnar. Pláss er fyri 20 luttakarum á hvørjari eind.

| | | |
|---|---|---|
| **Eind 1:** | **Heilsufrøðilig viðurskifti** | **31. jan., 1. og 2. febr. 2000** |
| **Eind 2:** | **HACCP** | **14., 15. og 16. febr. 2000** |
| **Eind 3:** | **Íverksetan og viðlíkahald av innaneftirlitinum** | **28. og 29. febr. og 1. mars 2000** |

| | |
|---|---|
| **Málbólkur:** | Stjórar, góðskuleiðarar og starvsfólk, ið saman við góðskuleiðaranum hava ein virknan leiklut í innaneftirlitsarbeiðinum á fiskavirkjum, kryvjivirkjum, verksmiðjuskipum o.ø. |
| **Undirvísarar:** | Serfrøðingar í innaneftirliti. |
| **Stað:** | Hotel Føroyar í Havn, allar dagar kl. 9.00-17.00. |
| **Skeið-kostnaður:** | Kr. 3.000 fyri hvørja eind (verður kravt inn undan skeiðinum) |
| **Próvtøka:** | Skipað verður fyri próvtøku í øllum trimum eindunum eftir lokið skeið. |

Frálæran fevnir m.a. um:
Smáverulívfrøði, framleiðsluumhvørvið, reingerð, sjálvrøkt, vandamálsgreining, góðskuskoðan, skjalastýring, uppbygging og íverksetan av innaneftirliti.
Freistin at boða frá luttøku er **19. januar 2000.** Tilmelding fer fram við at ringja til Fiskivinnuskúlan á tlf. 424573, ella um teldupost: fiskvest@fiskvest.fo. Til ber eisini at senda ella faxa okkum innskrivingarseðilin niðanfyri. **Tilmelding er bindandi.** Skeiðið er treytað av nóg stórari undirtøku.

**Fiskivinnuskúlin**
Postrúm 96, 350 Vestmanna
Tlf. 424573 - Fax 424428

**Innskrivingarseðil til skeið í innaneftirliti**

**Eind 1:** ___ Set kross **Eind 2:** ___ Set kross **Eind 3:** ___ Set kross

| | |
|---|---|
| Eftirnavn: | Føðingardagur: |
| Fornavn: | Starv/arbeiðspláss: |
| Gøta: | Tlf. arbeiði: |
| Postnr./stað: | Tlf. heima: |
| Teldupostur: | Gjaldari: |




**BLANDIMASKINUR**
**Effektivar - lætt handfarandi og robustar blandimaskinur í std. 145 - 160 - 180 litur eru á goymslu. Umframt hesar útvega vit aðrar std. og modell eftir ynski.**
**Kaj Andreasen Pf.**
**Sandvíkarhjalli**
**Tlf. 315600 - Fax 318008**

sosialurin
www.sosialurin.fo

**Norðurlandahúsið í Føroyum**
*Sí SVF tekstvarp s. 650*

**Reyði krossur Føroya**
Sorgarlinjan hjá Reyða Krossi Føroya svarar allar dagar frá kl. $17^{00}$ til $23^{00}$
212380


## Innskriving av næmingum

til 1. flokk komandi skúlaár verður í skúlanum mánadagin 17. jan. kl. 14. Havið dóps- ella navnaseðil við.

**Stranda skúli**
**Tlf. 44 79 55**

## Ársaðalfundur

hjá Føroya Astma/Allergifelag verður í MBF húsinum leygardagin 12. februar kl. 13.00.

Skrá sambært lógum felagsins.

Grein 9
Lógarbroyting

Uppskot um lógarbroyting skulu vera nevndini í hendi 4 vikur áðrenn aðalfundin.

**Nevndin**

## Nýtt!

Alt arbeiði innan húsabygging, umvæling, bjálving, tætting, viðgerð av vindeygum, uttandura timbur og jarn.

- Ókeypis orkuspariætlan fyri sethús.

**Húsasmiðurin Spf.**
**v/ Erik Møller • Tlf. 36 19 77**
ynskir komandi viðskiftafólki eitt gott ár 2000



**Advokatfelagið**
Yviri við Strond 4 • Boks 359 • FO-110 Tórshavn
Tlf. 311260 • Fax 311261
Telefontíð: $9^{30} – 12^{00}$ og $13^{00} – 16^{00}$
e–mail: advfelag@post.olivant.fo

Tórmóður Djurhuus, adv. Dánjal Magnussen,adv.
Jógvan Páll Lassen, adv. Petur Even Djurhuus, adv.
Jógvan E. Ellefsen, adv. Anna Dam, adv.
Ingi Højgaard, adv.

# Hús og jørð á Sandi til sølu!

Vegna deyðsbúgv, ið verður viðgjørt við Føroya Skiftirætt, verða hesar ognir lýstar til sølu:

- **Sethús bygd á matr.nr. 59 b, Sandur. Sethúsini eru uml. 70 m² til støddar, bygd uml. 1946-1947 í einari hædd, har grundstykkið er 575 m² við ástandandi hjalli og úthúsi. Sethúsini hava miðstøðuhita (oljufýr), lágan kjallara og ovastaloft eins og gang, køk, spísikamar (kovi), stova, 4 kømur og wc (sitikar/vaskirúm).**
- **Harumframt verður seld jørð, fatandi um trøð til støddar 10788 m² norðuri við Snapilsá, 1030 m² innangarðs (Sjúðramørk) og ein gyllin uttangarðs í Fjallshaganum. Jarðarognin hevur matr.nr. 59 a, Sandur.**

Áhugaði verða biðin um at venda sær til

**Advokatfelagið Yviri við Strond 4**
**Postrúm 359 • FR–110 Tórshavn**
**Tlf. 311260 • Fax 311261**

## Suðuroyar Ellis- & Røktarheim

Vegna farloyvi verður søkt eftir:

Einari sjúkrasystir í fullari arbeiðstíð í skiftandi vaktum frá 1. februar 2000 til 30. september 2000.

Einari sjúkrasystir í fullari arbeiðstíð í skiftandi vaktum frá 1. februar 2000 til 30. juni 2001.

Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Sjúkrasystrafelag Føroya.

Nærri upplýsingar viðvíkjandi størvunum kunnu fáast við at venda sær til fyristøðukvinnuna tlf. 37 16 66 lokal 147.

Umsóknir við avriti av prógvum skulu verða at senda til:

**Suðuroyar Ellis- & Røktarheim**
**Fyristøðukvinnan**
**Postsmoga 51**
**800 Tvøroyri**

innan 27. januar 2000.

*Halt* **sosialin**

**Advokatfelagið**
Yviri við Strond 4 • Boks 359 • FO-110 Tórshavn
Tlf. 311260 • Fax 311261
Telefontíð: $9^{30} – 12^{00}$ og $13^{00} – 16^{00}$
e–mail: advfelag@post.olivant.fo

Tórmóður Djurhuus, adv. Dánjal Magnussen,adv.
Jógvan Páll Lassen, adv. Petur Even Djurhuus, adv.
Jógvan E. Ellefsen, adv. Anna Dam, adv.
Ingi Højgaard, adv.

# Virkisbygningur og leysafæ í Sumba til sølu

Vegna konkursbúgv verður hervið lýst til sølu virkisbygningur á leigugrund matr. nr. 227 a, Sumba.

Bygningurin er til støddar 184 m² og hevur verið nýttur til virking av saltfiski.

Harafturat verður lýst til sølu fylgjandi leysafælutir vegna sama konkursbúgv

eitt flekiborð,
vaskifavnur,
ein gamal trukkur,
ein flekimaskina av merkinum BAADER 188,
umleið 400 stk. falmingokassar,
ein vekt Knud Grundvig av merkinum AVERY,
ein Scanvekt,
ein last til lastbil,
15 europlatter,
7 kør á 800 litur og 1 kar á 1.000 litur,
uml. 50 stk. 100 liturs kassar.

Boð uppá ognina og uppá leysafæið skulu latast undirritaðu skrivliga, hetta seinast hin **20. januar 2000, kl. 16.00.**

## Pedagogur

Í tíðarskeiðnum frá 1.2. til 31.12.2000 er eitt starv, 30 tímar um vikuna sum pedagogur leyst at søkja, fyri sáttmálasettar pedagogar í lønarflokki 11/17 + viðbót.

Um ongin pedagogur søkir starvið, kann hjálparfólk verða sett.

Á bústovninum, sum er fyri autistar, búgva tveir dreingir og tveir aðrir koma til umlætting.

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og F. Pedagogfelag.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til leiðaran Jóhonnu Hansen millum kl. 9-14 gerandisdagar.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum, skal verða bústovninum í hendi í seinasta lagi 27.1.

**Bústovnurin við Garðavegin**
**700 Klaksvík • tlf. 45 63 10**

**Toll- og Skattstova Føroya, Stýrið**

# Automatisk sjálvuppgáva 1999

Um 15. februar skrivar Toll- og skattstovan eina skattauppgerð út til persónar, vit meta okkum at hava rættar upplýsingar um í fyribilsskránni.

Tey, sum fáa skattauppgerð á henda hátt, eru persónar undir fullari skattskyldu, og sum í fyribilsskránni 1999
bert hava A-inntøku
og
ikki hava frádráttir
og
ikki sjálvboðin hava ávíst løn gjøgnum skattaskipanina
og
ikki hava eitt persónligt vinnuvirki.

Hesi hava tó skyldu at lata inn sjálvuppgávu, um so er, at upplýsingarnar á skattauppgerðini, tey fáa, ikki eru rættar. Sjálvuppgávur fáast á Toll- og Skattstovuni.

**Tey, ið ikki hava annan frádrátt enn eftirlønartrygging, og sum annars lúka omanfyrinevndu treytir, kunnu fáa automatiska sjálvuppgávu/skattauppgerð, um tey innan 1. februar 2000 lata Toll- og Skattstovuni skjalprógv fyri inngoldnari eftirlønartrygging í 1999.**

**Ognaruppgerð**
Á sama hátt sum í fjør er bert neyðugt at lata inn ognaruppgerð, um broytingar eru í ogn og skuld í mun til 31. desember 1998.

Tó skulu persónligt vinnurekandi, og tey, ið eiga ogn uttanlands, altíð lata inn ognaruppgerð.

## Ársaðalfundur

Havnar Arbeiðsmannafelag lýsir til ársaðalfundar á Hotel Føroyum leygardagin hin 29. jan. kl. 16.00 við hesi dagsskrá:

1. Frágreiðing frá farna ári
2. Framløga av roknskapi til góðkenningar
3. Val av 2 nevndarlimum og 2 tiltakslimum
4. Val av grannskoðara.
5. Ymist

**steðgur við ábiti.**

Aftaná steðgin verður ársaðalfundur eftirlønargrunnsins við hesi dagsskrá:

1. Frágreiðing um virkið grunnsins í farna ári
2. Framløga av roknskapi til góðkenningar
3. Val av 1 nevndarlimi
4. Val av grannskoðara
5. Ymist

Bussur koyrir av Vaglinum 15 min. áðrenn fundin og oman aftnaá.

**Nevndirnar**